# Grønlandstíðindi
Kári við Stein

Grønlandstíðindi:

# Lítið av rækjum hjá smærru bátunum

**Kári við Stein greiðir dag fyri dag frá fiskivinnutíðindum úr Grønlandi**

**2. mars**

Í dag eru – 19 stig og stilli. Polar Qaassiut kom inn at landa í morgun. Teir hava knappa fulla last, og teir hava ligið fyri tað mesta her í Dýpinum saman vid Polar Amaroq. Lómur er inni og landar í dag.

**6. mars**

Í dag eru – 26 stig stilli. Her er aftur ísur so langt sum eyguni røkka. Hann liggur heilt suður ímóti Manitsoq. Lómur og aðrir smærri bátar liggja inni fyri ís. Rækjunar eru so smáar, sum teir hava fingið seinastu tíðina, so tað lønar seg ikki at fara og bróta seg út í gjøgnum ísin.

Steffan C .liggur uppi í kassanum út fyri Kangatsiaq. Teir royna bert við einum troli fyri tíðina. Polar Aassik kom inn til Nuuk at landa í dag. Teir hava roynt á Fylla Banka.

**8. mars**

Í dag er – 15 stig og stilli. Frætt er frá Atlantic Enterprice, at teir mangla 60 tons í last, so aftur til Pamiut at landa. Aftaná fara teir til Harbour Grace at bunkra og skifta fólk. Natarnaq er á veg til Reykjavíkar at landa, so teir hava teir fulla last. Annunguaq II og Lómur og fleiri av teimun smærru bátunum hava ikki loyst aftur orsakað av ísi og lítlari veiðu.

**10. mars**

Í dag eru – 13 stig og stilli inni á, men tað er norðan uttanfyri. Lómur og aðrir bátar loystu í gjár nýggjan túr, og Polar Amaroq er á veg til Nuuk at landa við fullari last. Teir skulla skifta fólk, og síðani skullu teir til Eysturgrønlands at royna.

**11. mars**

Í dag er – 19 stig og stilli. Atlantic Enterprice kom til Pamiut í gjár vid 750 tonsum av rækjum, sum teir skulla leggja upp har.

Polar Qaasiut kom inn at landa tað, sum var umborð og at skifta manning. Síðani fara teir til Eysturgrønland at royna.

**12. mars**

Í dag eru -18-19 stig og stilli. Her er opið suðureftir, men at hyggja norðuryvir er ísur so langt, sum eygað røkkur. Akamalik kom til Nuuk at landa í morgun og at skifta fólk. Teir hava roynt har suðuri á ymiskum leiðum. Akamalik skal royna einar tríggjar vikur afturat, so skal skipið á Skipasmiðju í Danmark.

Polar Assik kom inn til Nuuk í morgun vid fullari last av rækjum. Teir royna út fyri Nuukleiðina.

**14. mars**

Í dag er – 12 stig stilli inni á, men stormur av norði til havs. Ísurin er farin í sor í nátt, og tá lýsti fyri degi, vóru fýra jollur riknar til havs. Ein av teimun smáu rækjutrolarunum fann tær og kom inn við teimun øllum fýra. So lagið var frálíkt niðri á kajuni. Lómur kom inn at landa í morgun. Ikki veit eg, hvat teir høvdu, men eg hoyrdi í morgun, at rækjufiskaríið her um okkara leiðir er syndarligt. Ein segði, at sjey av teimun smærru trolbátunum høvdi fingið um 40 tons tilsamans í fýra samdøgur.

**16. mars**

Í dag er stilli og - 14 stig. Qaqqatsiaq hevur verið inni í Nuuk og landað knappa fulla last eftir trimum vikum. So onkur fær rækjur í Vesturgrønlandi. Teir fóru út aftur í kvøld. Teir skulla inn at skifta fólk tann 23 mars. Frætt er frá Ocean Prawns, at teir hava 480 tons inni. Har hevur verið keðiligt veður og kalt og lítið at fáa, men nú var líggjari og betri veður. Tað sá út, sum um tað fór at bragda við fiskarínum. Inuksuk er inni og landar í Kanada knapt 400 tons.



*Hetta er ein sjáldsom sjón at síggja her um okkara leiðir. Ongatíð hava æðu ligið so nær inni í havnini í Sisimiut áður og ongin ampi er á teimun. Siglir tú onkran túr við báti tínum og tú sær æður, so fara tær á flog minst 10 byrsumál frá tær, so her er broyting komin í. Fyri nøkrum árum síðani var tað bara skarvur, sum lá og fiskaði inni í havnini. So svongd er onkustaðni ...*





## Mikudagur 1. apríl

15:00 Tíðindi
15:10 Seinnapartsending – Mirjam Pætursdóttir og Barbara Holm
16:00 Tíðindi
16:10 Seinnapartsending
17:00 Tíðindi
17:15 HALLO ØLL børn – Undirhildið við upplestri, sangi og práti. Vertur er Annika Steintórsdóttir.
17:45 Tónleikur
18:30 Tíðindi
18:45 Tónlekur
21:00 Úr skjáttuni
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

## Hósdagur 2. apríl

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsending – Úr Bakkastovu Við Ljósá
10:00 Lýsingar
10:05 Morgunsending – Úr Bakkastovu Við Ljósá
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunsending – Úr Bakkastovu Við Ljósá
12:00 Tíðindi
12:15 Hitt-tónleikur
13:00 Úr Bakkastovu Við Ljósá
14:05 Úr Bakkastovu Við Ljósá
15:00 Tíðindi
15:10 Rock-balladir
16:00 Tíðindi
16:05 Bilradio – Magnus Gunnarsson er vertur
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi
18:45 Tónleikur
21:00 Orð á leiðini
21:30 Tónleikur
00:00 Liðugt

## Fríggjadagur 3. apríl

07:00 Tónleikur
08:00 Bilradio (e)
09:00 Morgunsending
09:30 Morgunsending
10:05 Morgunsending
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunsending
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan – Send eina heilsan umvegis www.ras2.fo
15:00 Tíðindi
15:10 Varpið – Nýggj sending, sum verður gjørd í samstarvi við Televarpið.
16:00 Tíðindi
16:05 Varpið
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
21:00 Tónleikasending hjá Heimamissiónini. Torfinn Jacobsen leggur til rættis.
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

RÁS 2 ...títt radio




## Bilradio

### Hósdagin kl. 16.05

Samrøða er við Geir Wardum frá Nordjysk Lift, um tað sum fyritøkan hevur at bjóða. Teir hava spesialiserað seg í útleigu av so at siga øllum amboðum.

Eisini er prát við Jógvan Hans Joensen í Miðvági í sambandi við at 50 ár eru liðin síðan hann keypti sín fyrsta hýruvogn og byrjaði sítt virksemi. Jógvan Hans hevur verið í bilbransjuni í mong ár og verið ein pionérur innan motortesting av bilum. Hann hevur t.d. havt sínar egnu Bosch testmiðstøðir í Havn og í Miðvági.